í stuttum

Lagt til rættis: Eyðun Klakstein



## Hundar úr 50'unum

Amerikumenn hava tiltøk við øllum hugsandi og óhugsandi evnum. Nú um dagarnar var ein parada í Idaho, sum kallaðist Lost In The 50s. Hetta var eitt afturlítandi tiltak, har fólk fóru í klæði, sum vórðu brúkt í fimtiárunum. Hesir báðir hundarnir høvdu eisini gjørt seg út til paraduna við 50'ara sólbrillum. *Mynd: Polfoto*

## Pamela var illa uppløgd

Pamela Anderson hevur júst verið í Cannes í Fraklandi fyri at gera reklamu fyri sínum seinasta filmi, Blonde and Blonder, men kanska hevði tað verið betri fyri hana, um hon ongantíð fór til Cannes. Pamela, sum vanliga dámar væl at verða avmyndað, kom tveir tímar ov seint til eina avtalu við myndamenninar, og tá ið hon umsíðir møtti, vildi hon bara seta nakrar fáar minuttir av til myndamenninar. Tað fekk fjølmiðlafólkini á staðnum at buha eftir amerikonsku blondinuni. Hon segði seinni, at hon var sjúk.



## Desperatur vakurleiki

Teri Hatcher ein av kvinnunum í sjónvarpsrøðini um desperatu húsmøðurnar í USA. Hon gevur í eini samtalu við amerikanskt tíðarit nøkur góð ráð um vakurleika. Eitt av ráðunum er at fara í vínbað.

- Onkur hevur fortalt mær um, at tað eru nógvir góðir ingrediensir í víni, og um tú hevur eina upplatna flósku av víni standandi, sum tú ikki ætlar tær at drekka, kanst tú bara tøma hana í vatnið í baðikarinum, sigur Teri Hatcher.





## Eyka tungvekt

Japansku sumo-glímararnir eru stórir – sera stórir. So tað gongur ikki stillisliga fyri seg, tá ið hesir stóru menn fara til hendurs frammanfyri túsundtals áskoðarum. Sumo-ítróttin er stór í Japan, og meistarin Yokozuna fekk av at vita, tá ið hann bardist við Aminishiki nú um dagarnar. Hendan dagin var Aminishiki omaná, men dysturin teirra millum varðar í 15 dagar, og tí skuldi meira enn eitt gott syft til fyri at vinna. Spurningurin er, um nakað er eftir av glímarunum, tá ið teir hava glímast í 15 dagar. *Mynd: Polfoto*



## Smíl til fotografarnar

Stórur áhugi er fyri tiltøkunum á World Cinema Foundation, sum er ein altjóða filmsstevna í franska býnum Cannes. Amerikanski leikstjórin Martin Scorsese nýtist ikki at stúra fyri at verða gloymdur millum tær mongu stjørnurnar, sum eru til filmsstevnuna. Týsdagin stillaði hann upp til myndatøku, og myndamenninir stóðu næstan uppi á hvørjum øðrum fyri at fáa eina góða mynd.
*Mynd: Polfoto*

Sosialurin